Hvítanes 28. september 2020

Til Rættarnevnd Løgtingsins

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 21/2020.

Skjótisamband Føroya fegnast um, at løgmaður hevur tikið stig til at gera ábøtur á vápnalógina, soleiðis at tað gerst lættari hjá okkara ítróttarskjúttum, at ferðast uttanlands til venjingarlegur og kappingar við byrsu.

Men havandi í huga alsamt herdu krøvini, um trygd allastaðni í londunum rundan um okkum, tá ræður um handfaring av vápnum, so skilir Skjótisamband Føroya ikki, hví Løgmansskrivstovan, sambært uppskotinum hevur valt, at síggja burtur frá kravinum, at føroyskir skjúttar skulu hava vápnaprógv **við** vápnatrygdarskeiði, tá teir fara uttanlands.

Sagt verður í viðmerkingunum í uppskotinum, at týdningarmikið er at hava reglur um útflutning, fyrst og fremst orsakað av trygdarávum. Men onkursvegna verður kortini ikki hildið neyðugt, at somu fólk, sum fara uttanlands við vápnum, har krøvini eru munandi harðari enn okkara, skulu hava eitt góðkent trygdarskeið, fyri at kunna ferðast við og nýta byrsuna uttanlands. Hetta kann vera beinleiðis vandamikið.

Løgmansskrivstovan hevur arbeitt fyri, at føroyska vápnaprógvið kann nýtast sum grundarlag fyri at fáa gestavápnaloyvi í útlondum, m.a. í Danmark. Skjótisambandið stúrir fyri, at møguleikin at ferðast við vápnum, og at kunna nýta hesi uttanlands, uttan at hava góðkent vápnatrygdarskeið, kann vera við til at máa støðið undan lógini, og endamálinum um at skapa størri trygd á økinum, og kann verða við at seta føroyska vápnaprógvið á ein svartalista uttanlands.

Vinarliga vegna Skjótisamband Føroya
Esmar Joensen
Formaður

SKJÓTISAMBAND FØROYA
Email: skot@skot.fo
WEB: https://skot.fo